## Reglur um útblaking

Á hvørjum ári verða næstan 20 milliónir tons av fiski tveit í havið, og á fundi í einari eftirlitsnevnd hjá FAO fyri stuttum kom Noreg við einum uppskoti um, hvussu endi skal fáast á hesum óskilinum. Helga Pedersen, fiskimálaráðharri, sigur við NTB, at norska uppskotið miðjar eftir at gera altjóða reglur um hjáveiði og útblaking. Ráðharrin sigur, at tað er sera umráðandi, at allir fiskastovnar verða hagreiddir á ein burðardyggan hátt, og hesum tóku hini londini eisini undir við, sigur hon. Við grundasrlagi í uppskotinum hjá norsku stjórnini fer FAO nú undir at orða reglur um hjáveiði og útblaking, skrivar NTB.



## Hvalbiar kommuna hevur fingið nýggja heimasíðu

Sum ein liður í at fáa tættari samband við sínar borgarar hevur Hvalbiar Kommuna nú fingið nýggja dagførda heimasíðu. Ætlanin við síðuni er at geva borgaranum eina so góða kunning sum til ber og samstundis skal borgarin kunna brúka síðuna til at koma í samband við kommununa, stendur at lesa á heimasíðuni www. hvalba.fo




*Tíðindini í Kringvarpinum eru ikki til sølu. Tað slær Annika Mittún Jacobsen, stjóri í Kringvarp Føroya, fast*

# Tíðindini ikki til sølu

**Kringvarpsstjórin og tíðindaleiðarin í Kringvarpinum vísa staðiliga aftur at talan er um nakra avtalu um at keypa tíðindi aftur fyri at lýsa við rástevnu. – Eingin kann keypa sær tíðindaflutning, óansæð hvussu víkur og vendir, sigur Annika Mittún Jacobsen**

TÍÐINDAFLUTNINGUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Í gjár var ráðstevna í Norðurlandahúsinum um framtíð Føroya í evropeiskum samanhangi. Í tí sambandi høvdu fyriskiparararnir fingið kenda norska politikaran Thorvarld Stoltenberg til Føroya at halda fyrilestur.

Tað hevur stórt tíðindavirði, at slíkur maður kemur til Føroya, og sjálvsagt vilja allir tíðindamiðlar hava teimum tíðindunum. Men seinastu dagarnar hava fleiri søgur gingið um, at fyriskiparin av ráðstevnuni, Óli Samró, skal hava fingið ókeypis lýsingar í Kringvarpinum afturfyri at fyriskiparin skuldi senda Kringvarpinum tíðindi av ráðstevnuni.

### Avnokta avtalu

Tað vil so siga, at antin hevur Kringvarpið keypt tíðindi frá Óla Samró, og latið honum ókeypis lýsingar afturfyri, ella hevur Óli Samró keypt sær ókeypis lýsingar við at lova Kringvarpinum tíðindini av ráðstevnuni.

Men hesum vilja hvørki kringvarpsstjórin ella tíðindaleiðari í Kringvarpinum vita av.

- Eg havi ongar viðmerkingar umkring lýsingarnar yvirhøvur. Eg stýri heldur ikki tíðindaflutninginum í Kringvarpinum, og eg havi annars onga viðmerking til slíkt yvirhøvur. Hvør tíðindaflutningurin er, má tú tosa við tíðindaleiðaran um, sigur Annika Mittún Jacobsen, stjóri í Kringvarp Føroya.

- Eg kann bara staðfesta, at politikkurin hjá Kringvarp Føroya á tí økinum er, at eingin kann keypa sær tíðindaflutning og at vit selja ongum lýsingar fyri at keypa tíðindi frá teimum, slær Annika Mittún Jacobsen fast.

### Skal hava tíðindavirði

Tíðindaleiðarin í Kringvarpinum, Jón Brian Hvidtfelt, vísir staðiliga aftur, at talan er um nakra avtalu um tíðindi fyri lýsingar.

- Tvørturímóti, tað er eingin, óansæð hvør hann er, sum kann keypa sær tíðindi í Kringvarpinum. Tað er eisini politikkurin hjá Kringvarpinum, leggur Jón Brian Hvidtfelt dent á.

Harafturat vil hann sláa fast, at allur tíðindaflutningur í Kringvarpinum verður viðgjørdur eftir journalistiskum kriterium.

- Men at henda ráðstevnan verður viðgjørd í okkara miðili og í øðrum miðlum er, at henda ráðstevnan hevur eitt stórt tíðindavirði og kann verða eitt stórt fakligt input í samband við tað kjakið, ið verður um Evropa tær næstu vikurnar. Tað er altso ikki nakað við at vit hava keypt okkum nøkur tíðindi, vísir Jón Brian Hvidtfelt á.



*Jón Brian Hvidtfelt, tíðindaleiðari í Kringvarp Føroya, staðfestir at allur tíðindaflutningur verður viðgjørdur eftir somu journalistiskum kriterium, og at Krigvarpið ikki letur seg selja*